## DAGSINS MEINING

# Norðurbryggjan – nakað meira

Nú líður so mikið væl við arbeiðinum við Norðurbryggjuni í Keypmannhavn, at hetta komandi mentanarhúsið kann lata dyrnar upp í hesum mánaðinum. 27. november er ásettur til at vera sjálvur vígsludagurin. Lat okkum alt fyri eitt ynskja stigtakarum og brúkarum tillukku við hesum tiltakinum og má tað gerast ikki bert ein savnandi mentanardepil men eisini karmur um frið og semju millum menniskju og lond. Í einum heimi, har ófriður og órættvísi framvegis merkir gerandisdagin so nógv og er ein álvarslig hóttan, hava vit brúk fyri stovnum, húsum og karmum, sum ikki einans skulu hálova og menna mentan, men sum eisini við síni hjáveru kunnu mótvirka ófriði og órættvísi millum lond og menniskju. Karmum, sum byggja á kunnleika og kærleika millum fólk.

Nettupp eitt fleiritjóða mentanarhús sum hetta kann hava týdning í so máta. Mentan og kunnleiki hvør um annan eigur at hava víðari sikti enn "bara" tað at kunna fegnast og gleðast í sínum og um sítt egna umhvørvi. Hesi kunnu og eiga at geva okkum øllum íblástur til at skapa ein betri og ríkari heim fyri okkum øll.

Ætlanin við Norðurbryggjuni er at seta fokus á smátjóðirnar í Útnorði, Grønland, Ísland og Føroyar. Tað er gleðiligt, at serliga danir hava tikið stig til at skapa okkum henda nýggja karm og møguleika. Har vit kunnu savnast og sínámillum geva hvørjum øðrum nakað, og har vit samtíðis kunnu vísa umheiminum vegin til okkara kæru lond og mentanir. Gjøgnum slíkt hús kunnu vit koma nærri umheiminum, og umheimurin nærri okkum.

Útnorður fyllur nógv meira á heimspallinum enn vit gera okkum greitt. Hóast fá so eru vit stór – stór í tilfeingi og stór í mentanarligum ríkidømi. Ríkidømi, ið ikki bert skal halda lív í okkum, men sum eisini skal gagna restini av heiminum. Vit eru rík í so mangar mátar. Ikki bert hava vit stór tilfeingi í undirgrund og í havinum, vit hava eisini eina náttúru og eina mentan, sum gera okkum til nakað serligt. Góð 300.000 menniskju hava fingið eitt so ómetaliga stórt ríkidø mi at troyta og umsita – ja fingið tað til láns frá okkara eftirkomarum – at vit eiga eisini at umhugsa, hvussu hetta ríkidømi so ella so kann vera við til at skapa ein betri heim fyri onnur eisini.

Tað kann vera eina slíka uppgávu, sum Norðurbryggjan eisini kann vera savnandi um. Har vit við okkara egnu mentan og hjáveru í Útnorði og okkara óavmarkaða ríkidømi kunnu geva okkara íkast til stríðið fyri frið og rættvísi. Hví ikki síggja Norðurbryggjuna eisini sum ein av mongum lyklunum til eina betri verð, har vit kunnu vera fyrimynd fyri onnur samtíðis sum vit við hesum húsi eisini kunnu fáa íblástur frá øðrum. Tá hevur Norðurbryggjan tænt sínum endamáli. Latið ikki hetta góða mentanarhús gerast eitt tiltak fyri tey fáu og tey múgvandi. Latið tað gerast eitt fólksins mentanar- og friðarsinshús. Eitt evarska lítið forum, sum kann geva eitt stórt íkast til tað góða og menna ndi í okkum menniskjum. Ein lítil pallur, sum torir at vera við til at flyta mørk á tí stóra altjóða palli, ið vit øll, rík sum fátæk, ung sum eldri, sjúk sum frísk, hvít sum svørt, kristin sum muslimar, ja øll eru partur av.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# 4.800 ov nógv

**Hergeir Nielsen**



Javnaðarflokkurin hevur nú í fleiri umførum seinastu árini sæð seg noyddan at brúka nazistisku oddafiskarnar í stríði sínum fyri at verða hoyrdur í føroyskum politikki.

Sjálvur floksformaðurin kendi seg kallaðan at brúka hetta ótespiliga og skitna vápnið undir valstríðnum seinast, og er í skrivandi løtu farin at kunna okkum um, at tey í javnaðarflokkinum eru farin at taka dagar millum propagandakynstrið hjá Hitler og tað hjá dr. phil, Joseph Goebbels.

Sum skilst, so er tann seinni meiri átuligur og viðkomandi at brúka í føroyskum politikki heldur enn tann fyrri. Hann er jú bæði dr. phil og eitur Joseph, frættist nú av sosialdemokratiska fjallinum.

Vit onnur halda nakað heilt annað um hesi bølmenni og eru hvørki upp á for- ella eftirnavn við tey, og taka harafturat størst møguligu frástøðu tí politikki, sum legði alt Evropa í oyði.

Umrøðan av føroysku fíggjarlógini avmarkaði seg so heldur ikki til bara at grava hesi viðtýggi upp úr eiminum. Nýggjari og meiri viðkomandi samanberingar vóru eisini neyðugar fyri at allýsa og flokka okkum tjóðveldisfólk saman nøkrum av teimum verandi bølmennunum eitt nú í ETA.

Ein tingmaður javnaðarfloksins fekk so eisini átalu frá formanninum í einum seinni umfari, tá ið hann fyri aðru ferð kendi seg kallaðan og endurtók skuldsetingar sínar um sambandið millum Tjóðveldisflokkin og ETA.

Eftir mínum tykki var tað ein undanstøkking at siga, at talan var um ein spurning, ið ikki skuldi átalast. Talan var púra greitt um eina niðurstøðu og staðfesting av eini samanrenning millum ein útlendskan yvirgangsfelagsskap og ein føroyskan flokk, og tað er álatuvert, tá tað verið borið fram á løgtingsins talarapalli. Eisini tá ið niðurgerandi ákæran er ílatin eitt spurnartekin.

Lættliga kann eitt og annað gleppa tingmonnum av munni, sum betri var ósagt, og ikki ber til at tiga við afturvirkandi kraft.

Sjálvur fekk eg lítlan tíma frammanundan átalu frá formanninum fyri at siga Andrass Samuelsen, fyrrverandi formann sambandsfloksins, hava forðað fyri at 2.000 kr. vóru latnar Føroya Fólkaháskula við teirri grundgeving, at tað var betri at hjálpa føroyingum á danskar háskúlar. Hetta var í 1927, og varð hetta sagt í einum aftursvari til annan tingmann.

Løgtingsformaðurin helt tað vera skeivt at endurgeva deyðar menn, sum ikki fingu svarað fyri seg.

Sum tingmaður eigur tú at fylgja formansins átalum, hóast tjakið á tingi gerst í so tannleyst, um deyðir menn verða dripnir uppaftur, og okkum ikki unnist møguleika at endurgeva teir upp á gott og ilt.

Eg haldi framvegis mína útsøgn vera rímiliga sámuliga, og ta hjá javnaðarmanninum í so niðrandi. Mín útsøgn er átalað og sostatt vánaligur tingsiður, meðan orðalag javnaðarfloksins hevur vunnið sær hevd á tingi eftir avgerð formansskapsin, og sostatt vert at taka uppaftur. Sig so tað.

Skuldsetingarnar móti tjóðveldisflokkinum hava nú nøkur ár á baki, og hava hesir ótespiligu hógvar javnan stungið seg upp, tá ið andaligi førningurin hjá mótstøðufólki okkara hevur skotið seg.

Vit minnast soleiðis formann javnaðarfloksins, og onkran sambandsmannin eisini, hava syft ákærur av hesum slag eftir okkum undir valstríðnum, og stásið verður hildið við líka enn dagin í dag.

Mær vitandi hevur tjóðveldisflokkurin einki havt við nazistarnar at gera, og einki í floksins politikki ber brá av nøkrum samanhangi tann vegin. Meðan vit í tjóðveldisflokkinum stutt sagt einki hava ella høvdu til felags við hesi bølmenni, ið týndu 6 mió fólk undir 2. heimsbardaga, stóð danski javnaðarflokkurin teimum munandi nærri, tá høvið beyðst.

Tá brúk var fyri at hevda suverenitetin, ella fullveldi yvir Føroyum, vóru trygdarviðurskifti okkara slept upp á fjall, meðan danski forsætismálaráðharrin, Stauning, bjóðaði nazistunum vælkomnum til Danmarkar at vera, og álegði dønum at meta hesar sum egnu vinir teirra.

Hesin Stauning var javnaðarmaður og stóð høgt í metum millum føroysku lagsbrøður sínar.

Hóast ríkilig høvi, so kundi eingin okkara droymt um at kasta føroyska javnaðarflokkinum nakað sum helst fyri í so máta, og vónandi gerst tað seinur dagur, at nakar okkara ger tað.

Tað mest tragiska í øllum hesum rokinum er, at talan var ikki um tilvildarlig mistøk, ella at nakað glapp nøkrum úr munni í sinnismuni.

Boðskapurin var væl fyrireikaður og festur á blað í skrivaðari talu. Tjóðveldisfólk skuldu í sama posa sum hópdrápsmenn, mordarar og yvirgangsmenn av ringasta slag.

Rætthugsandi javnaðarfólk hava sjálvandi nógv hægri mið og mál, men floksformaður teirra hevur tíverri í fleiri umførum vart avstumpaða boðskapin sum sín egna.

Vanligi føroyingurin trýr sjálvandi ikki einum orði av hesum perfidu skuldsetingum teirra, men ein eftirmetingin er so sjálvandi, at javnaðarflokkinum onkursvegna hvítvaskar nazistar og onnur yvirgangsfólk í samanberingum sínum við friðarligar føroyingar.

4.800 vóru ov nógv til jarðaferðina hjá Karl Dönitz, skrivaði Karl Otto Meyer í Flensborg Avis, tá 5.000 fólk fylgdi eftirmanni Hitlers til gravar tann 6. januar 1981.

Tey áttu heldur at havt krógva seg, enn at vakt upp gomul minni, segði Karl Otto, sum er ein kendur stríðsmaður móti nazismuni og fyri donskum áhugamálum á marknaleiðini Danmarkar Týskland millum.

Nú kenna vit so nøkur afturat, ið áttu at krógva seg burtur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Propagandaherðferðin hjá varaløgmanni et al. heldur fram
## – hesaferð á heksajagt eftir Katrin Dahl Jakobsen

**Regin Eikhólm**



Lygnin hevur ferðast runt hálvan heimin áðrenn sannleikin nær at lata seg í skógvarnar, sigur Mark Twain (1835-1910). Kanska gevur hetta okkum eina ábending um, hví veruleikin er tyngri at dansa við enn fiktiónin.

Eitt viðkomandi dømi um hetta er tá Katrin Dahl Jakobsen ( KDJ) á tingi í eini viðmerking til fíggjarlógina

9/10-03, í einum broti valdi at átala varaløgmann fyri hansara propaganda framferð, og vantandi sannleikavirði. Eitt nú tá hann beint undan fólkatingsvalinum proklameraði at, "oljan er funnin". Hetta var ósatt, men tað vistu fólk ikki, og tí gav hetta fólki eina óveruliga ósanna optimismu. At geva fólki falskar vónir og mála alt ljósareytt, og harvið fyrigykla fólki ein annan veruleika, var eitt nógv brúkt amboð undir 2. veraldarbardaga, førdi KDJ fram. *"Eg troysti mær ikki at nevna navnið á tí persóninum, men nakað av hesum snildunum hava okkara konservativu nationalistar eisini brúkt."*

### Ikki Hitler men partiellar Goebbels snildir

Temaðið í omanfyristandandi hjá KDJ er um propaganda og ósannindini hjá varaløgmanni. Við at associera ella samantvinna 2. veraldarbardaga við propaganda og lygn, kemur eittans navn fram á skermin, nevniliga Joseph Goebbels (1897-1945), ræðandi demagogur og propagandaministari v.m.

Í viðmerkingini hjá KDJ er heilt einfalt ongin annar associatións møguleiki enn Goebbels. Vert er tó at leggja til merkis, at eingin beinleiðis samanbering verður gjørd, men bert ein partiel ábending. Hon sigur nevniliga, at *"nakað av hesum snildunum hava okkara konservativu nationalistar eisini brúkt."*

At varaløgmaður hesi seinastu 5-6 árini hevur verið ein ræðandi demagogur og propagandaministari, eru vit mong sum kunnu taka undir við.

Tey, sum ivast í hesum pástandi, kunnu gjøgnumganga bløðini í hesum tíðarskeiðnum og har síggja, hvat loysingarherferðin hevur borðreitt við úr verbalkøstinum. Eisini kunnu áhugað lesa "Frágreiðingina um 80-árini, Føroya Løgting §19 nevndin 2000", og "Færøerne i bankkrisens tegn, Richard Mikkelsen, Handelshøjskolens forlag 2001", og samanbera við útsagnir hjá varaløgmanni.

Er tað hinvegin onkur sum ynskir meiri loysingarpropaganda so les "Myten om rigsfællesskabet, Høgni Hoydal, Lindhardt og Ringhof 2000" ella síggj nýggja filmin hjá Ullu Boye Rasmussen um sama evni.

### Hvussu uppstóð lygnin

Hvussu uppstóð lygnin um, at KDJ skal hava samanborið varaløgmann við Hitler himself? Helst ein kærkomin møguleiki til at flyta fokus frá fiktiva politikkinum hjá varaløgmanni og samstundis niðurgera og seta anstøðuna við KDJ í ringt ljós. Hinvegin so ljóðar Hitler av meiri enn Goebbels. Men her hevur pennaførarin hjá varaløgmanni, Sjúrður Skaale, gjørt eitt mistak, tí Hitler ynskti at ekspandera og fáa "Lebensraum", meðan olmussudýrið varaløgmaður, ein konservativur nationalromantikari, ynskir tað mótsatta. Frá at vera í einum ríki við yvir 2.044.431 $km^2$ so ynskir varaløgmaður at minkað tað til 1399 $km^2$. Við ørðum orðum, so eru Hitler og varaløgmaður tvær inkommensurablar støddir, tvs at teir kunnu als ikki samanberast, tí teir vilja hvør sítt! Nú umboðar varaløgmaður bert 25% av okkum føroyingum, og er tí politiskt ov lítil til at hata og ikki nóg stórur til at elska. Varaløgmaður líkist tí líka so lítið Hitler, sum undirritaði líkist Kong Salamon.

### Innlit frá løgtingsskrivstovuni og niðurstøða frá Fróðskaparsetrinum

Tað sum fekk undirritaða at taka pennin, og ringja til løgtingsskrivstovuna, fyri at fáa útskrift av KDJ's viðmerking, var tað sum stóð í sosialinum 1/11-03, har Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðingur frá Fróðskaparsetrinum verður biðin um at siga sína hugsan um málburðin herfyri í løgtinginum. Fyrsta svarið er "*Andalig armóð*" , og seinni verður sagt, at *"Seinasta dømið, tá løgtingskvinnan Katrin Dahl Jakobsen samanbar landsstýrismannin Høgna Hoydal við Hitler, heldur hann vera tað grovasta, hann hevur hoyrt á tingi."*

Vit fáa tó ikki at vita, út frá hvørjum upplýsingum fólkalívsfrøðingurin kemur til sína bersøgnu og eintýddu niðurstøðu, ella um tað kanska er journalisturin ið borðreiðir við Goebbels doktrinini: "Endurtak eina lygn nóg ofta og fólkið trýr tí." Hetta kundi annars verið áhugavert at vita.

Omanfyristandandi undirstrikar, at KDJ hevur rætt í sínum associatiónum, tí hetta minnir alt ov nógv um fordums kendan framferðarhátt. Fyrst illgitingar við ósannindum og propaganda og eftirfylgjandi kemur blástemplingin frá hægri lærustovni av vísindaligum autoriseraðum persóni (professorførleika) í góðari trúgv og intaktum trúðvirði.

Skal hetta ikki gerast dagligur kostur, mugu vit tora at siga frá ella rópa varskó.

### At tora

At tora, er at missa fótafesti eitt bil, men ikki at tora, er at missa lívið, sigur Søren Kierkegaard (1813-55). Katrin Dahl Jakobsen tordi, men tað kostaði henni eina heksajagt!

Hennara djarva viðmerking - hóast av summum mistulkað - hevur longu sett gongd í eina viðkomandi og tiltrongda debat um etikkin í føroyskum politikki. Tað verið seg í løgtinginum, landsstýrinum ella í valorrustum og í fjøllmiðlunum yvirhøvur. Hetta í sjálvum sær var eina heksajagt vert. Kanska varaløgmaður et al. tekur mistulkingina sum ein maður og biður um umbering. "Livet forstås baglæns, men må leve forlæns", sigur Søren Kierkegaard!

# Guð elskar øll børn og allar prestar

Hvør skapti blómurnar sungu vit í gróthúshjallinum
guð í himlinum sungu vit og tá ið genturnar fyri eitt fimmogtjúgu oyra
knappaðu blusuna upp og avdúkaðu síni surrealistisku eydnuhjól
og fingu okkum at mala rundan um okkum sjálvar í elektriskum
heilaskjálvta vistu vit at guð eisini hevði skapt
sólina og stjørnurnar

og tá ið vit sóu prædikumannin fara framvið
við sínari bíbliu undir arminum
og tá ið vit sóu naglarnar í hurðini og greipurnar ið hingu har
á bjálkunum og hømiliurnar ið toygdu seg inn millum rimarnar
sum leiftrandi tarabløð og tá ið vit sóu hvussu hugagóðar ritupisurnar
kulkaðu í seg seiðamurtarmnar vit høvdu fiskað til teirra
gjørdist okkum greitt at guð eisini hevði skapt fiskarnar vit vistu
at guð hevði skapt teg og meg og at guð var góður —

jú sanniliga guð elskaði okkum smádreingir
fingu vit ikki alt vit peikaðu á sluppu vit ikki at síggja
og nema við alt tað vit droymdu um -

ja sanniliga er guð góður
hann elskar øll børn og hann vil fegin leiða tey gjøgnum lívið
hann vil fegin leiða tey heilskapað uttan um allar forðingar og meinbogar
á vegnum uttan um arabisku sáplarnar og jødisku grátimúrarnar
uttan um heilagu kríggini og sjálvmorðsbumburnar

uttan um parfumeraðu kardinalarnar sum sova við opnum munni
og pynta seg við rúsandi sólstrálum
uttan um pedofilo klerkarnar onanerandi niður í katólsku doypifuntarnar
uttan um týningarlegurnar og síðhærdu hvalastingararnar
ið syngja hari hari undir fremmandum
og álvarsomum stjørnum

meðan nátt er í havnargøtum
og menn ganga í gummiskóm og drekka whiskey

uttan um rullandi vertshúsini og altetandi bønhúsini
uttan um piercaðu búkdansarinnurnar í Filadelfia og øðrum samkomum
uttan um merkiligu klivplanturnar í Kelduni
uttan um grillbarrirnar og pylsuvognarnar
og bonaðu dansigólvini

uttan um heimleysu ólukkudýrini ið dálka gongubreytirnar
og kirkjugarðarnar uttan um balsameraðu fyllibytturnar
útstappaðar við dálkaðum revsiváttanum vánaligum yrkingum
sum klistra til rivjabeinini

men hann vil eisini vísa teimum
blomstrini sum vaksa sjálvt í skitnastu bakgørðunum
millum nálir og fløskubrot
millum hattleysar standmyndir og skríggjandi kuvøsur
vísa teimum at eisini í hellum undir jørð og millum huldfólk
er lívið heilagt

hann vil vísa teimum at sjálvt í ullveldinum føroyar
er vargur í mappudýrunum at har eru fólk sum skríggja
til helvitis við kommunismuni til helvitis við kapitalismuni
vísa teimum at sosialisman er fagrasta yrkingin
hann hevur skrivað í teirra óspiltu hjørtum

men hann hevur so nógv um at vera
hann hevur úr at gera við at taka sær av teimum vaksnu
ið ongantíð verða liðug við síni kríggj
og sínar pínligu kærleiksgølur
og tí plantar hann síni smíl á vegirnar
har tey syngja sum hvít fótaspor á svarta asfaltinum
og í steinsettu túnunum

og eisini um veturin tá ið kavin er lagstur
kaga tey uppundan í alskyns litum sum nýklaktar balletdansarinnur
úr túsund og einari nátt

men guð elskar eisini allar prestar og hann sigur við teir: komið til mín
og eg skal taka tykkum í favn og troysta tykkum

og eg skal geva tykkum eina reina blankafulltrú
so tit kunnu taka tykkum av mínum smáu og mínum konfirmantum
og leiða tey inn til lívið og útaftur
hinumegin.

**66**